## Knúsa fartelefonina

Svenska Aftonbladet skrivar, at tryggasta leiðin at ganga, tá nýggj fartelefon verður keypt, er at knúsa gomlu telefonina. Blaðið keypti herfyri 10 gamlar telefonir, sum vórðu sendar til norska IBAS, sum veitir serfrøði í at fáa fatur á annars mistum data. Og á øllum telefonunum megnaði IBAS at finna gomul SMS-boð, myndamoð og upptøkur frá myndatólinum í telefonunum. Tí eru hyggjuráðini, um tilfar av hægsta trúnaði er á gomlu telefonini, at knúsa hesa, heldur enn at selja telefonina.

## 10 teir størstu nørdarnir

Tað eru 10 menn, sum standa ovast á listanum, nú CNET hevur gjørt ein lista yvir størstu nørdarnar í heimssøguni. Ovast á listanum stendur Nikola Tesla, sum gjøgnum alt lívið gjørdi hópin av royndum við streymi, og sum eisini var tann, sum av fyrstan tíð skapti veksul-streymin, sum øll húsarhald í dag nýta. Aðrir á listanum eru Steve Wozniak (apple), Alan Turing (kotubrótar), Bill Gates (Microsoft) og Charles Babbage (Matematikari)



*Nikola Tesla*

# Góðskumeting til virkir og stovnar

**Nýtt felag er sett á stovn, sum skal veita góðskueftirlit til stovnar og fyritøkur. Talan er um FA. Dygd við Johonnu Feilberg. Felagið er tað fyrsta føroyska felagið, sum veitir tænastur av slíkum slag**

GÓÐSKUMETING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Johanna Feilberg, sum er stovnari av Fa. Dygd, er útbúgvin laborant. Hon hevur áður arbeitt hjá Faroe Seafood. Nú roynir hon seg sum tann fyrsta í Føroyum innan góðskumeting av matvørum. Øll virki, sum framleiða matvøru, skulu fylgja ynsum krøvum, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan. Johanna kann nú hjálpa virkjum við teirra góðskustýring, so at tey lúka krøvini.

Dygd kann veita slíka tænastu til fiskavirkir, bakarí, kommunur og onnur.

### Millumliður

Dygd kann vera ein millumliður millum virkini einumegin og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna hinumegin. Dygd kann gera góðskukanningarnar fyri virkið og síðani senda tað til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Tilvitaðir kundar og økt kapping ger, at størri krøv verða sett til reinføri og góðsku. Tí kann tað vera ein fyrimunur fyri eina fyritøku at fáa onkran uttanífrá at góðskumeta sína vøru. Sí meira um fyritøkuna á heimasíðuni www.dygd.fo

**FAKTA**

**Jóhanna Feilberg**
Útbúgvin laborantur í 1993
Hevur arbeitt hjá Faroe Seafood
Stovnari av Fa. Dygd, sum heldur til í Skálafirði



*Johanna Feilberg úr Skálafirði hevur stovnað nýtt felag, sum skal veita tænastur innan góðskumeting til virkir og stovnar*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Hotellskipið hjá póllendingunum. Hetta skipið, sum nevnist "Explorer" er leigað úr Danmark*



*Arbeiðsmenninir gera klárt inni í byggihøllini*



*yggingina*

# Sáttmálin virði á 75 milliónir krónur

Á heimasíðuni hjá Skipasmiðjuni stendur soleiðis um sáttmálan millum P/F Thor og P/F Torshavnar Skipasmiðju:

Um stívliga eitt ár fær P/F Thor í Hósvík eina skraddaraseymaða skipaloysn frá P/F Tórshavnar Skipasmiðju. Ein av høvuðsorsøkunum til at stóri sáttmálin varð veruleiki, er at útlendskur undirveitari smíðar skrokkin í Føroyum.

Fyrrapartin mánadagin 17. juli 2006, skrivaðu P/F Thor og P/F Tórshavnar Skipasmiðja undir stóran byggisáttmála í Hósvík. Thor letur smíða stívliga 55 metrar langt veitingarskip, sum felagið skal nýta í virksemi sínum í frálandavinnuni. Skipið er eitt sonevnt kombinerað support/chase-skip, ella eitt veitingarskip, sum tað verður rópt um okkara leiðir. Skipið skal millum annað sigla útgerð til seismikkskip, ið sum kunnugt sjáldan koma til bryggju.

Alt arbeiðið verður gjørt í Føroyum; eisini skrokkurin, sum Tórshavnar Skipasmiðja letur útlendskan undirveitara gera á skipasmiðjuni á Skála. Við at lata alt skipið smíða í Føroyum, heldur Hans Andrias Joensen, forstjóri í P/F Thor, at heimsumfevnandi felagið við høvuðsstøð í Hósvík fær fleiri fyrimunir.

Farið verður undir at smíða veitingarskipið í heyst, og lidna skipið verður ætlandi latið P/F Thor 15. november komandi ár. Sáttmálaupphæddin er tilsamans góðar 75 milliónir krónur.

*Kelda: www.skipasmidjan.fo*

## Móttøka hósdagin

**Hósdagin verður móttøka á Skipasmiðjuni á Skála í samband við, at byggingin byrjar. Mánadagin koma 25 póllendingar. Í gjár komu tríggir póllendingar til landið. Bilførarin, arbeiðsformaðurin og kokkurin. Teir 25 póllendingarnir fara heim aftur á jólum, og aftaná nýggjár koma 50 póllendingar til Føroya. Teir búgva allir í hotellskipinum Explorer. Teir skulu arbeiða 20 tímar um dagin í skiftivaktum, soleiðis at tað vera tvey arbeiðstoymi. Í frítíðini sleppa teir millum annað niðan í høllina ella á vøllin.**